# Bygdarráðsfundur

# Hvalbiar Kommuna

**Dagfesting:** 12.12.2022 kl. 17.30

Á fundi: Janus Thomsen
Ronni Hammer
Niels Olaf Eyvindsson
Eir J. Norðberg
Martin í Nesi
Poul Laust Christiansen (fyri Thorstein Thomsen)
Hans Cecil Poulsen (fyri Gunnhild Mortensen)

Skrivari: Johanna B. Djurhuus

**1. 102-116-2022: Kommunustýrisfundir 2023.**

Uppskot um kommunustýrisfundir í 2023.

**Avgerð**:

Samtykt varð einmælt at taka undir við uppskotinum, men at fundirnir verða kl. 16.30.

**2. 102-115-2022: Innkomin tilboð uppá bátabrúgv.**

Innkomnu tilboðini eru:

| | |
|---|---|
| SF Pontona – 30 m aldubrótari + brúgv | kr. 597.580,00 u/MVG (við frakt) |
| Nordocks AS – 30 m aldubrótari + brúgv | kr. 909.718.58 u/MVG (við frakt) |
| S.J.H. Comm. Divers – 30 m aldubrótari + brúgv | kr. 525.610,00 u/MVG (uttan frakt) |

**Vega- og havnanevnd 05.12.2022:**

Meirilutin í nevndini mælir til at taka av tilboðnum frá SF Pontona kr. 597.580,00 u/MVG.

**Fíggjarnevndin 12.12.2022:**

Nevndin hevur sama tilmæli sum Vega- og havnanevndin. Hetta verður eykajáttað í 2023 og fíggjað við tøkum peningi.

**Avgerð:**

Einmælt samtykt at fylgja tilmælunum hjá nevndunum.

**3. 102-117-2022: Skriv frá skúlastýrunum í Suðuroynni um skúlasálarfrøðing.**

Skúlastýrini heita á kommunurnar í oynni at samstarva um ein sálarfrøðing.

**Trivnaðarnevndin 20.10.2022**:

Nevndin mælir til, at peningur verður settur av á fíggjarætlanini fyri 2023 – mettur kostnaður tilsamans kr. 480.000,00.

**Fíggjarnevndin 12.12.2022:**
Samtykt varð at mæla til at geva Trivnaðarnevndini heimild at arbeiða víðari við hesum, m.a. hvat kostnaðurin verður.
**Avgerð:**
Einmælt samtykt at fylgja tilmælinum hjá Fíggjarnevndini.

4. **102-114-2022: Tilboð frá Føroyar.Live – beinleiðis vevmyndir.**
Kostnaður fyri uppsetan av vevmyndatóli, eftirlit, viðlíkahald og endurnýggjan er kr. 2.800,00 um mánaðin fyri Hvalba og Sandvík.
**Fíggjarnevndin 12.12.2022:**
Samtykt varð einmælt at mæla til ikki at taka av hesum tilboði.
**Avgerð:**
Einmælt samtykt.

5. **102-51-2021: Umsókn um byggiloyvi til sethús á matr. nr. 129d, Hvalba.**
Søkt verður um byggiloyvi til at umvæla eitt hoyggjhús til sethús.
**Tekniska nevnd 05.12.2022:**
Samtykt varð einmælt at mæla til at fylgja tilmælinum hjá byggimálsviðgeranum og geva byggiloyvi til sethús á matr. nr. 129d, Hvalba við teimum undantøkum, at atkomuviðurskiftini verða eftir almennu gøtuni niðan til matr. nr. 129d og húsanummarið verður 121b. Parkeringarviðurskiftini verða víst til almennu parkeringina niðri á vegnum.
**Avgerð:**
Samtykt varð einmælt at beina málið aftur í Teknisku nevnd, sum skal kanna atkomuviðurskiftini til og frá ognini.

6. **102-110-2022: Eykajáttan 2022 – 2. viðgerð.**
Umsókn um eykajáttan kr. 5.740.000,00.
**Fíggjarnevndin 12.12.2022:**
Samtykt varð einmælt at mæla til at taka undir við umsóknini um eykajáttan 2022.
**Avgerð:**
Einmælt samtykt.

Fundarbókin lisin og skrivað undir. Fundur lokin kl. 18.40

Janus Thomsen Ronni Hammer Niels Olaf Eyvindsson Martin í Nesi

Eir J. Norðberg Poul Laust Christiansen Hans Cecil Poulsen